# TILTØK

## BRÚDLEYP

Leygardagin 6. desember kl. 16.00 giftast í Tvøroyrar kirkju Joan Símunardóttir Poulsen úr Oyndarfirði og Bjarni Joensen av Tvøroyri. Brúdleypið verður hildið á Hotel Øravík kl. 19.00 fyri innbodnum.

Leygardagin 20. desember kl. 11.30 giftast í Vesturkirkjuni Rannvá Hentze Rasmussen, Argir og Dávid Reinert Davidsen, Tórshavn. Veitsla verður í Leguhúsinum í Nesvík kl. 15.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 313303 ella 314699 áðrenn 5. des.

## 90 ÁR

Í dag, 29. november verður Herluf Matras, Ánir 90 ár. Dagurin verður hildin í Sambýlinum á Heygnum millum kl. 15-18. Tey, sum vilja heilsa uppá Herluf, eru vælkomin.

## 65 ÁR

Niels Pauli Danielsen, sóknarprestur, Klaksvík, fyllir 65 ár á Niklasarmessu leygardagin hin 6. desember. Føðingardagurin verður hildin frá kl. 18 í KFUM og -K í Klaksvík, har øll eru vælkomin.

## 70 ÁR

1. desember verður Niclas Agraberg Poulsen, Porkeri 70 ár. Føðingardagurin verður hildin við opnum húsið leygardagin 6. desember.

## 80 ÁR

30. november verður Elvira Sumberg, Vágur, 80 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

Mánadagin 1. desember verður Petur Petersen, fyrrv. prestur, búsitandi á Fugloyarvegi 8 í Havn, 80 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

## SILVURBRÚDLEYP

Týsdagin 9. desember hava Hildfrí og Kaj Egon Fagraberg, Miðvágur silvurbrúdleyp. Opið hús verður heima leygardagin 13. desember frá kl. 18.00, har øll eru hjartaliga vælkomin.

Týsdagin 9. desember hava hjúnini Anna og Leivur Sørensen, Syðrugøta, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík 30. desember kl. 20. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma, verða vinarligast biðin um at siga frá á tlf. 441208, 442032 ella 456160 áðrenn 20. des.

## GULLBRÚDLEYP

Týsdagin 16. desember hava Dania og Kaj í Bartalsstovu, Syðrugøtu, verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík sunnudagin 14. desember kl. 15.00. Tey, ið vilja gleða gullbrúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 441025/228939 áðrenn 6. desember.

## PRÓGV

Urd Johannesen, Tórshavn, hevur hin 21. november lokið prógv sum master of arts í Arts Management við lærda háskúlan, City University, í London.

**Gudstænastur**
**1. sunnudag í advent**
*Havnar kirkja:* kl. 11, Sonja Klein. Talvan gongur fyri Føroysku Sjómanskirkjuna
*Vesturkirkjan:* kl. 11, altarg., Heri Jeonsen
*Argir:* kl. 11, familjugudstænasta, Bergur D. Joensen. Talvan gongur í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi fyri Føroysku Sjómanskirkjuna
*Klaksvíkar Sjúkrahús:* kl. 10,
*Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30,
*Christianskirkjan:* kl. 11, altarg., Hans Eiler Hammer
*Kunoy:* kl. 12, altarg., Niels Pauli Danielsen. Talvan gongur í Norðoya vestara prestagjaldi fyri Føroysku Sjómanskirkjuna
*Eiði:* kl. 11.40 skriftamál, kl. 12 messa,
*Norðskála:* kl. 17, ljósgudstænasta, Emil Olsen. Talvan gongur í øllum kirkjum í Eiðis prestagjaldi fyri hina Føroysku Sjómanskirkjuna
*Sandavágur:* kl. 12, David Johannesen. Talvan gongur í Vága prestagjaldi fyri Føroysku Sjómanskirkjuna
*Vestmanna:* kl. 12, Inga Poulsen Dam. Talvan gongur í øllum Norðstreymoyar prestagjaldi fyri Føroysku Sjómansmissiónina
*Hvalvík:* kl. 12, altarg., Mogens T. Christensen
*Leirvík:* kl. 12 altarg., og offurgongd, Uni Næs. Farið verður aftur í kirkjuna nú umvælingarnar í kirkjuni eru lidnar
***kl. 19*** konsert við kórinum Gøta-Leirvík
*Nes kirkja:* kl. 11 (kirkjan verður 160 ár), Martin R. Jacobsen. Talvan gongur fyri Føroysku Sjómanskirkjuna
*Fríðrikskirkjan:* kl. 14, familjugudstænasta,
*Gøta:* kl. 15 familjugudstænasta, Martin R. Jacobsen
*Fuglafjørður:* kl. 12, lestur, kórsangur. Í Fuglafjarðar prestagjaldi gongur talvan fyri Føroysku Sjómanskirkjuna
*Rituvík:* kl. 11, Meinhard Bjartalíð. Talvan gongur fyri Sjómanskirkjuna
*Sjóvar kirkja:* kl. 17, ljósmessa. Í Sjóvar prestagjaldi gongur talvan fyri Føroysku Sjómanskirkjuna
*Porkeris kirkja:* Sunnudagin gongur talvan fyri Føroysku Sjómanskirkjuna
*Tvøroyri:* kl. 11 altarg., Jónsvein Bech. Talvan gongur fyri Føroysku Sjómanskirkjuna
*Hvalba:* kl. 12.30, Ólavur Rasmussen. (Talvan gongur til frama fyri Føroysku Sjómanskirkjuna)
*Vágs kirkja:* kl. 11 gudst., P. de Neergaard. Talvan gongur fyri Føroysku Sjómanskirkjuna
*Sandur:* kl. 12, Jákup R. Hansen. Talvan gongur í Sandoyar prestagjaldi fyri Føroysku Sjómanskirkjuna

Í Glyvra prestagjaldi gongur talvan fyri Føroysku Sjómanskirkjuna

Í Norðoya eystara prestagjaldi gongur talvan fyri Føroysku Sjómanskirkjuna

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11 Møti, Feltsersjantarnir Irena og Eyðunn Christiansen tala og leiða. Eingin sunnudagsskúli, men kl. 17 skipa skótarnir fyri Familjutíma við drekkamunni. Øll eru vælkomin.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 Bíbliugransking og barnabíbliutími. Evnið: Samrøða við Gud, kl. 11 Gudstænasta, J. V. Danielsen, kl. 17 venur sangkórið.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti, kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 12 verður eisini møti har Benny Drewsen talar. Sunnukvøldið kl. 21 verður Bønar- og lovsongsløta fyri ung í aldrinum 13-19 ár.
Mánakvøldið kl. 19 Ungdómstiltak, sum verður annaðhvørt mánakvøld í vetrarhálvuni og er ætlað ungdómi 5.-10. flokk.
www.hebron.fo

**Samkoman Rhema**
Fríggjakvøldið kl. 20 J C Teens – spennandi ungdómsmøti har nógv ymiskt er á skránni.
Sunnudagin kl. 17 Møti og sunnudagsskúli, Svein Askildsen talar. Hvønn sunnudag er spennandi upplegg fyir børn s.s. sangur, skipað undirvísing, søgur, ítriv o.a. Hetta er dagurin fyri alla familjuna. Eisini verður kaffi. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

**Missiónshúsið við Landavegin**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á vanligu støðunum, kl. 18 Møti.

**Samkoman Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin familjumøti kl. 10.30 við Annu og Jenis av Rana og tilbiðjunarmøti kl. 12 har Jógvan Z. talar um evnið: »Tær sjey samkomurnar í Opinberingini – Týatira. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Sunnudagsskúli er kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini.
Týskvøldið samlast húsbólkarnir.
Heimasíðan. www.livdin.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 18 Familjumøti Delli skipar fyri. Mánakvøldið kl. 20 Missiónsbønarmøti.
www.filadelfia.fo

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti. Týsdagin kl. 17 Frítíðararbeiði.
Mikudagin kl. 17.30 AWANA, kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
www.ebenezer.fo

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa og barnadópur við Pater Torsten Jortzick í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi. Sunnudagsskúli kl. 14.
Síðsta sunnudag í hvørjum mánaði verður tilbiðjan av tí Heilaga Sakramentinum í Mariukirkjuni frá kl. 15 til 18. Serliga vilja vit biðja fyri okkara meinigheit og tí henni tørvar. Tú ert vælkomin at koma við bønarevnum skrivliga, ið verða løgd framman fyri tað heilaga Sakramenti. »Verið her og vakið við mær, vakið og biðið«.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
30. nov. Møti v/ Tey ungu.

**Meinigheitshúsið**
Leygardagin kl. 16-18.30 Foreldur og børn hittast. Kl. 19.30-22 Juniorhugni.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli har Gratia og Fríða & Maria syngja. Kl. 18 Møti við Sverra Steinhólm, Tær 4 syngja.

**KFUM og KFUK í Havn**
Sunnudagin kl. 19.30 í KFUK: Adventsfest, Kristiliga sangkórið verður við. Inngangur við Hans Jacob Joensen bispi.
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Heina Petersen úr Sandavági og Theodor Hansen úr Havn. Evnið: Øld er liðin, Jákup Joensen bispur.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.

**Samkoman Immanuel**
Sunnudagin kl. 13 Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti.

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti. Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*»Um nakar ikki verður verandi í mær, verður hann kastaður út sum ein grein og følnar«*

*Jóh. 15, v. 6*

Í gomlu søgnini um Gásadalsrisan Tóra rama og Mykinesbúgvan, nevndur Óli rami, hann, sum at enda vann sigur á risanum í harða bardaganum teirra millum, mátti risin fyri at tiggja lív lova Mykinesbúgvanum 3 sjáldsamar lutir, sum framyvir á hvørjum ári skuldu koma til mykinesar, m.a. eitt stórt rekatræ, men eina varð lagt við, at ikki mátti gávan spottast ella speirekast, tí so fóru teir at missa hana med alla.

Er tað ikki sama áminning, okkum verður givin í orðunum, har vit verða ámint um, at greinarnar kunnu missa sambandið við træið – at sjálvsagdi felagsskapurin, ið skuldi verið har millum træið og tess greinar kann forkomast og missast. Og tí verður heitt á okkum at verða verandi greinar á trænum, og so sjálvandi ikki at spotta ella speireka hesa okkara gávu og lívssamband, sum tá ið greinarnar fara til hendurs at berjast sínámillum – tá tann eina greinin frøist yvir vanlagnu hjá grannagreinini, ella ein onnur roynir við hóttanum og veipanum at kappa greinina omanfyri av ella ein triðja roynir at royta nálir og bløð av greinini í neðra fyri soleiðis at fríðka seg sjálva – heldur enn at royta tær allar áttu at peika á tað træið, har tær vóru settar og í lívi og levnaði royndu at byggja upp og lívga um træið heldur enn við sjálvsøkni og maktgirnd bara at hugsa um sjálvan seg og sína egnu grein. Eitt træ er ein heild, har allar greinarnar eiga at sleppa upp í part – har tær allar fingu sína uppgávu at røkja, og so skuldi verið sjálvsagt, at tær allar virdu hvørja aðra aldan tíð, at uttan træið eru tær einki, sum eisini út frá teirri sannroynd, at heldur ikki træið kann verða greinarnar fyriuttan. Trænum nýtist greinarnar fyri at vera eitt træ, og missir træið greinarnar, ella fara greinarnar í sjálvsøkni at kappa hvørja av ella kappa av sambandið við træið, so verður ikki leingi, at træið følnar og doyr. Og tá hava vit sjálvi sagað ta greinina av, har vit sita og vóru sett. At tað lættliga kann henda, verða vit ámint um í dag; men so skulu vit við myndini av trænum eisini hoyra gleðiboðini um, at við Jesusi er ikki talan um nakað vanligt træ, heldur ikki víntræ. Ja, hann er og verður eitt løgið, ískiljandi træ, sum hvør ein urtagarðsmaður mundi havt ringt eyga á, tí hetta træið er longu felt. Langa fríggjadag høgdu teir træið niður, og júst tá kom tað – enntá í deyðanum – at bera mikla frukt. Hetta træið, sum okkum óskiljandi fær sítt liv frá hinum æviga Guði – træið, sum heldur ikki deyðin kundi gera enda á, men ið sum krossins træ ber okkum gleðiboðini um, at eisini har vit snávaðu og sviku, har var hann verandi álitið, og har vit í synd okkara royndu at fella træið, har vildi Guð tað øðrvísi.

**Martin Restorff Jacobsen, prestur**



# TILTØK

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Jóhan Hendrik Hansen.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Týskvøldið kl. 20 Opið hús fyri ung.
Telefonandaktin 424741.

**Nazaret, Kaldbak**
Á møtinum sunnukvøldið kl. 18 verður luttøka úr Betesda Klaksvík, við talu og sangi.

**Missiónshúsið í Hvalvík**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Johannes Mortensen og Sólbjørg Símunarson, Tórshavn. Innsavnan til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Nerija á Skála**
Møtirøð við evninum: Kristus í Hebrearabrævinum. Á møtinum í kvøld kl. 20 og sunnudagin kl. 18 talar Osvald Kjærbo og aðrir.

**Lívsins Orð**
Sunnudagin kl. 17 Møti við ungdómsbólkinum.
Tim 4 verður mánadagin og ungdómsmøti kl. 20. Øll eru vælkomin.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Í dag kl. 15 Barnamøti kl. 20 talar Heri Tróndheim og Gittit syngur. Innsamling til HM.
Sunnudagin kl. 15 Barna-/og foreldramøti í kirkjuni við Jógvan Højgaard, Barnakórið syngur. Kl. 19 Møti við Niels J. Nielsen trúb. Ung av Strondum og Skála syngja. Innsamling til húsið. Barnaansing í Meistarahúsinum.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, Andreas Andreasen talar. Streingjakórið syngur. Innsavnan til húsið. Drekkamuður aftaná. Øll eru hjartaliga vælkomin. www.jesus.fo

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við Arna Abrahamsen.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Tummas Jacobsen. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í kelduna.
www.keldan.fo

**Missiónshúsið, Gøta**
Ungdómsmøti verður í kirkjukjallaranum í kvøld kl. 20, Oggi Lamhauge úr Søldarfirði luttekur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gøta**
Týskvøldið kl. 20 Glyvra-Hanusarshús, bibeltime v/ Peter O. K. Olofson: Advent.

**Tabor, Toftir**
Ungdómsmøti í kvøld kl. 20. v/ Jónu Thomsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Thabor, Fuglafirði**
Ungdómsmøti í kvøld kl. 21. Í morgin verður Familjumøti við adventshugna kl. 17. Nátturði verður aftaná. Av tí sama verður eingin vanligur sunnudagsskúli

**Berøa, Saltangará**
Møti við Pól Færø verður sunnukvøldið kl. 18 og mánatýs- og mikukvøldið kl. 19.30. Evnið verður andalig sjálvrøkt. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnukvøldið kl. 18 Ungdómsmøti v/ Ásbjørn Berthelsen.

**KFUM & K í Norðoyggjum**
Missiónsmánaðurin endar hesa vikuna. Bønarløta er hvørt kvøld kl. 19.
Fríggjakvøldið kl. 19.30 Møti við Hans Kristian Johannessen. Effata av Strondum syngur.
Leygardagin kl. 10 Áhugatími við Peter O. K. Olofson. Evnið: Ånden i glasset. Kaffi, te og rundstykkir verður at fáa. Kl. 19.30 verður møti við Leo Hans Mikkelsen, Ungdómskórið í Vágunum syngur.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti við Bergur Debes Joensen. Gospelkórið Gleði og Dupultkvartettin í húsinum syngja. Innsavnan til Heimamissiónina. Nátturði eftir møti.
Kl. 21 Ungdómsmøti/eftirmøti við Bergur Debes Joensen. Gleði syngur.
Barnaansing er til øll tiltøkini. Møguleiki er at keypa bøkur, fløgur o.a. fríggja- og leygardagin. Ynskist bilur, so ring 457425. Øll hjartaliga vælkomin til øll tiltøkini. Sí eisini okkara heimasíðu www.kuff.fo

**Getsemane, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20 Hugnaløta fyri ung.
Sunnudagin kl. 18 Møti.

**Saron, Viðareiði**
Í kvøld kl. 19.30 verður almenn kvøldseta, har luttakarar í dagsins bíbliuskeiði fara at vitna saman við Svenning av Lofti, Páll á Lakjuni og Hjørleif Vang.
Sunnumorgunin kl. 11 og sunnukvøldið kl. 18 talar Svenning av Lofti.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsangsløta, kl. 18 Møti. Innsavnan til húsið.
Mánadagin kl. 17 koma børnini 1.-6. flokk saman. Kl. 19 samlast ungdómurin frá 7. fl. og eldri. Hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Sandi**
Evnismøtir verða fríggjakvøldið kl. 20, leygarkvøldið kl. 19 og sunnukvøldið kl. 18.

**Frá samkomum í Suðuroy**
Fríggjakvøldið kl. 21 og leygarkvøldið kl. 20 og sunnudagin kl. 14 verða evangelisk møtir **í bygdarhúsinum á Sandi**, við luttakarum úr ymsum samkomum úr suðuroynni.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Albert og John. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Porkeri**
Felagsmøti fyri Sumba, Vág, Porkeri og Hov verður sunnukvøldið kl. 18 við Sannu Hammer og Eivind Bech. Kórið í Porkeri og Ebba og Nimrod syngja. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur. Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

**Missiónshúsið í Vági**
Leygardagin kl. 16 Andakt í Sambýlinum.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Onki møti sunnukvøldið vegna felagsmøti í Porkeri.

**Sion, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánakvøldið kl. 21 Bønarmøti og bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Í kvøld kl. 20 Bíbliutími: Helviti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti við Elisabet og Sámal J. Joensen.
Týskvøldið kl. 20 Heimaforbundið.

**Føroyahúsið**
Sunnudagin 30. nov. kl. 17 verður evangeliskt møti í Føroyahúsinum, Vesterbrogade 17A, Keypmannahavn. Símun Pætur á Torkilsheyggi og Gunnar Nielsen luttaka. Á skránni verður eisini felagssangur og sangframførsla. Aftaná verður ókeypis drekkamuður. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Føroyskt felag í Ballerup**
Sunnudagin 30. nov. kl. 15 verður bingospæl í »Loen« á Ryttergården í Pederstrup. Nógvir góðir vinningar til børn og vaksin. Byrjað verður við at tendra adventskransin.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 1. desember*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-18 Gera dekoratiónir
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok, bobbspæl,dart og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan miku- og fríggjadagin, tlf. 316491
*Týsdagin 2. desember*
kl. 10-12.00 Vit baka til jóla
kl. 10-11.30 Jólasangløta, Jóhan R. Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 14.30 Jórun Fregnast. Jórun Simonsen um hennara lívssøgu. Aftaná verður prátað um at hava opið mikukvøld komandi ár
*Mikudagin 3. desember*
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Til ber at koma sum gestir
kl. 15 Túrur, vitja Smiðjuna í Lítluvík
*Hósdagin 4. desember*
kl. 10-10.30 Jólafimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17.00 Telduprát, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 5. desember*
kl. 10-13.00 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12.00 Døgurði. Til ber at koma sum gestir
kl. 13-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar**
*í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum*
*Mánadagin 1. desember*
Fimleikur v/ Jóhannu Troest. Drekkamuður
*Týsdagin 2. desember*
Drekkamuður. Ítrív fyri áhugað
*Mikudagin 3. desember*
Drekkamuður. Jórun Hansen spælir violin
*Hósdagin 4. desember*
Drekkamuður. Afturhvarv í práti og sangi
*Fríggjadagin 5. desember*
Opið hús. Kaffi, te og pannukøkur

*Eins og vanligt er, verður byrjað við einum Guðs orði, og framvegis eru luttakararnir vælkomnir at taka eitt og hvørt ítriv við sær, eitt nú stokkar o.a. Bløðini eru til taks í Fløvanum. Serflutningstænastan v/ Andreas Poulsen er byrjað. Hava tygum tørv á koyring, ringið vinarligast tlf. 448051.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoynni**
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa.
*Mánadagin 1. desember*
Sólrun Christiansen lesur 16. part úr søguni »Sin egen lykkes smed«.
*Mikudagin 3. desember*
verður farið til Skálavíkar til hugnakvøld. Farið verður úr Tilhaldinum við bussi kl. 17.30. Kostnaður 100 kr.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, miku- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.acadanmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Allir fundir eru roykfríir.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tinghúsvegur 37. Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla lærararaíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Heilafelagið**
*felagið fyri apopleksi- og afasirakt*
Íslandsvegur 10
tlf. 321520
T-post: heila@post.olivant.fo

**Felagið fyri lesi- og skriviveik**
*Postadr.: MBF-Húsið Íslandsvegur 10c*
Endamál felagsins er at hjálpa teimum ið hava lesi- og skrivitrupulleikar.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð men samband fæst við felagið á tlf. 441541, Anne Karin Kjeld og 318867, Laila Egholm.

**Parkinsonfelagið**
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 29.11. Eiði, tlf. 42 30 06
Sunnudagin 30.11. Fuglafjørður, tlf. 44 40 38

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 10-11. Tlf. 314544.